# Fótbóltsárið byrjar

**Allan Simonsen hevur tikið 20 leikarar út til fyrstu venjingarleguna á árinum, sum verður komandi vikuskifti**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Millum teir 20, sum nú eru tiknir út til fyrstu venjingarleguna á árinum, eru eisini onkrir leikarar, sum ikki hava verið á landsliðnum enn, men sum nú fáa møguleikan at vísa síni kynstur.

### Gevur nógv

Ein teirra er B68 málverjin, Magnus Poulsen, sum seinastu trý árini hevur vart málið hjá B68.

Magnus er annars uppvaksin í B36, og upp gjøgnum ungdómsárini hevur hann verið á yngru landsliðnum hjá FSF. Nú hann er tikin út til A-landsliðið, sigur leikarin sjálvur, at hetta fyri hann er eitt stórt herðaklapp.

- Sjálvsagt eri eg øgiliga fegin um úttøkuna. Tað at sleppa á landsliðið er jú nakað, sum mann altíð strembar eftir, so tað sigur seg sjálvt, at hetta er nakað serliga, heldur Magnus fyri, tá vit spyrja hann, hvat úttøkan merkir fyra hansara viðkomandi.

- Harafturat fer hetta ivaleyst eisini at bera við sær, at mann framyvir fer at kýta seg enn meira undir venjingunum, tí ein slík úttøka er altíð eggjandi í sjálvum sær.

Spurdur um, hví hann heldur seg vera úttiknan júst nú, sigur hann, at má helst vera avrikini higartil.

- Persónliga gekk árið í fjør væl hjá mær, og eg taki tað eisini sum eitt stórt herðaklapp, at eg nú eri úttikin. Eg veit fullvæl, at tað neyvan verður her og nú, at eg slái Jens Martin Knudsen ella Jákup Mikkelsen av liðnum, men bara tað at venja saman við teimum, fer heilt vist at geva mær nógv, sigur Magnus Poulsen at enda.

### Teir 20

Umframt Magnus, eru sum nevnt 19 aðrir leikarar tiknir út til venjingarleguna, og sær samlaði hópurin soleiðis út:

Magnus Poulsen, Øssur Hansen, Arnbjørn Danielsen, Fróði Benjaminsen, Jan C. Dam og Hans Fróði Hansen úr B68. Heðin á Lakjuni og Rógvi Jacobsen úr KÍ, Jens Kristian Hansen og Jákup á Borg úr B36, Jóhannis Joensen, Allan Mørkøre og Andrew av Fløtum úr HB, Christian H. Jacobsen úr NSÍ, Tór-Ingar Akselsen úr FS Vágum, Uni Arge úr ÍA Akranes, Jens Martin Knudsen, Sámal Joensen og John Petersen úr Leiftri og Pól Thorsteinsson úr Vali.

### Skráin

Hetta er sum nevnt fyrsta venjingarlegan í ár, og longu um tvær vikur, verður næsta venjingarlegan á skránni. Tá skulu leikararnir helst vera komnir hampuliga væl ígongd, tí stutt eftir er fyrsta dysturin á árinum settur at verða. Skráin fyri landsliðið í ár sær annars soleiðis út:



*Magnus Poulsen er ikki í iva í, at bara tað at venja við landsliðnum verður sera lærurík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

| | |
|---|---|
| 13.-14. januar | Venjingarlega í Føroyum |
| 27.-28. januar | Venjingarlega í Føroyum |
| 29. jan-1. feb | 31.01 NM-dystur: Svøríki Føroyar |
| 23. feb-4 mars | Venjingarlega í Spania |
| 21.-29. mars | 24.03 HM-dystur: Luksemburg-Føroyar |
| | 28.03 HM-dystur: Rusland-Føroyar |
| 31. mai-7. juni | 02.06 HM-dystur: Føroyar-Sveis |
| | 06.06 HM-dystur: Føroyar-Jugoslavia |
| 12.-16. august | 15.08 HM-dystur: Jugoslavia-Føroyar |
| 30. aug- 6. sep | 01.09 HM-dystur: Føroyar-Luksemburg |
| | 05.09 HM-dystur: Føroyar-Rusland |
| 04.-08. okt. | 06.10 HM-dystur: Føroyar-Slovenia |

# Pól fer ikki til Val



*Tað tykist í løtuni vera ein opin spurningur, hvar Pól Thorsteinsson fer at spæla hetta kappingarárið*

**Í løtuni er ógreitt, hvar landsliðsleikarin fer at spæla komandi kappingarár**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Í mun til landsliðsópirnir, sum í fjør vórðu úttiknir, er vágbingurin, Pól Thorsteinsson, á ein hátt nýggjur maður hjá Allani Simonsen.

Landsliðsárið í fjør fór alt sum tað var við leikbanni, og enn er ein leikdagur eftir av hesum banni.

Tað verður tó roknað við, at hann aftur fer at teljast millum teir føstu, tá bannið er runnið, men meðan tað sostatt tykist vist, at hann nú aftur verður á landsliðnum, so tykist einki at vera fastlagt, um hvørjum felagi Pól skal spæla við hetta kappingarárið.

Í fjør spældi hann við íslendska Vali, sum tryggjaði sær uppflyting til bestu deildini, men tað tykist ikki sannlíkt, at hann verður hjá Vali komandi ár.

Hvar Pól nú fer at spæla, er enn einki, sum bendir á, og sjálvur kemur leikarin heldur ikki við nakrari greiðari melding.

- Í løtuni kann eg bara siga, at einki konkret er í umbúna, og so er ikki stórt meira at siga um tað, sigur altso Pól Thorsteinsson.



*Tað styrkti nógv um hjá Tjaldri, tá útlendsku leikararnir komu, og nú eru fleiri ávegis*

# Tjaldrið verður sterkari

**Um stutta tíð koma tveir jugoslaviskir leikarar afturat til Tjaldur**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Einki er at ivast í, at tað kom væl við hjá Tjaldri, tá felagið í heyst fekk tilgongd av trimum jugoslaviskum leikarum. Ein til kvinnuliðið og tveir til mansliðið.

### Fleiri ávegis

Serliga hjá monnunum eru úrslitini batnað nógv síðani hetta, men eisini hjá kvinnunum hevur framgongdin verið sjónlig, tó at vektin í stigaposanum ikki er broytt so øgiliga nógv.

Undir øllum umstøðum hava tey í Runavík verið somikið fegin um nýggju leikararnar, at tey nú hava avrátt at fáa tveir leikarar afturat til landið.

Andreas Jacobsen, formaður í Tjaldri, sigur við Sosialin, at talan er um ein leikarar til ávíkavist kvinnu- og mansliðið.

- Talan er um ein miðspælara hjá kvinnuliðnum og ein vinstrahandaðan vongspælara hjá mansliðinum, og vónandi fara hesi at viðføra, at liðini verða enn betri fyri.

Andreas dylir ikki fyri, at tey í Runavík vóna, at við einum leikara afturat, kann mansliðið gerast somikið sterkt, at teir møguliga kunnu fara at arga fremru liðini heldur meira, enn teir hava gjørt higartil.

Við kvinnuliðnum ásannar hann, at her er málið fyrst og fremst at halda sætið í deildini, og skal hetta fyrst og fremst gerast við at vinna dystirnar móti Sóljuni úr Sandavági.

### Neyðugt við styrki

Andreas sigur annars, at eftir hansara tykki er hetta eitt neyðugt stig at taka, um felagnum skal vera lív lagað í bestu deildini.

- Tað er somikið stutt síðani, at vit veruliga byrjaðu at arbeiða við yngru leikarunum, og tí ganga enn nøkur ár, áðrenn tey fyrstu nýggju nøvnini fara at koma hjá okkum.

- Hetta er tó eitt øki, sum vit arbeiða nógv við nú, og tað er so eisini ætlanin, at nýggju leikararnir skulu vera við í hesum arbeiði. Fáa vit hetta at rigga, verður ungdómsarbeiðið enn betri, og hetta merki so aftur, at vit fáa enn fleiri leikarar, so í roynd og veru hongur alt saman í so máta, sigur Andreas Jacobsen at enda.



# Klaksvíkingar bukaðu havnarmenn

**Við stórsigri ímóti havnarmonnunum hava klaksvíkingar nú lagt seg á odda saman við kollfirðingum sum vunnu toppuppgerðina í Hvalvík. Gutti Petersen úr Sandavági framdi megnarbragd við sínum javnleiki ímóti IM John Rødgaard í dystinum ímóti vestmenningum**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Fýra umfør eru nú leikt í liðkappingini og stríðið um fyrsta pláss í 1. deild er økt nú klaksvíkingar eisini hava blandað seg uppí oddan. Havnamenn liggja nú hinvegin í tyngra endanum.

Dysturin í Havn hevði alstóran týdning. Dysturin ímillum feløgini bæði er av tratitión sera týdningarmikin, og eisini hava liðini ikki havt tann besta startin í kappingini, og tískil var ein sigur, helst stórsigur, á ynskilistanum hjá báðum stórfeløgunum. Rani Nolsøe varð ikki hjá vitjandi felagnum og á fyrsta borði sat tí tann royndi Steintór Rasmussen. Mótstøðumaður hansara var klaksvíksføddi Haldur Suni Johannesen sum síðani seinasta ár hevur telvað á havnarliðnum. Steintór fekk beinanvegin betri støðu, og tá Haldur ikki útviklaði fólk síni ov varð illa vorði hjá Halduri. Steintór fekk avviklað støðuna til vunnið endatalv og vann eisini.

Herluf Hansen og Tummas Martin Anthoniussen leiktu eitt heldur vilt talv á øðrum borði. Herluf kom í tíðarneyð og offraði rók við vón um ævigt skák, men leikti skeivt í avgerandi løtuni og tapti. Fyrr í talvinum átti Herluf at verið nøgdur við javnleikin, men satsaði alt fyri at vinna.

Útisetin Finnbjørn Vang var við á klaksvíksliðnum og tað varð ein sannur fongur. Hann vann nevnliga ímóti Olaf Berg í eyðkendum stíli. Fyrst offraði hann finnu og síðani fann hann taktiskan hátt at niðurberja Olaf.

Fyrrverandi føroyameistarin Súni Ziska var fyri fyrstu ferð í nógv ár aftur at síggja á havnarliðnum, og hann varð tann einasti ið fekk tikið stig frá klaksvíkingum, javnleikur ímóti ingolf Gaard sum møguliga átti at leikt víðari.

Heili 3,5-0,5 til KTF. Væntað var at klaksvíkingar møguliga vunnu dystin, men at munurin bleiv so stórur hevði fáur væntað. Havnarmenn sum vunnu FM í fjør, eru nú aftast saman við sandavágsmonnum og eru teir tí í einari talvligari krísu.

### Vunnu uttan stórmeistara

Kollfirðingar hava veruliga havt vind í seglinum í ár. Teir hava mist Torbjørn Thomsen til vestmenningar, men hava hinvegin fingið góða hjálp frá stórmeistarunum Tiger H. Persson og Henrik Danielsen. Men í toppbrakinum ímóti hvalvíkingum sum sanniliga eisini hava klárað seg væl, var Hans Kristian Simonsen ein teirra sum tapti. Hann tapti tó ímóti Martin Brekká har tað annars leikaði javnt á, men Hans Kristan bukkaði ein mann og tapti.

Bernhard Thomsen fekk spakuliga fyrimun ímóti Finnbjørn Zachariassen og tveir sterkir bispar avgjørdu talvið til hansara fyrimun. Útisetin og kollfirðingurin Pól Martin Hansen hevði finnu meir í frúgvuendatalvi ímóti Sámal Christiansen, men megnaði ikki at vinna. Grettir Djurhuus vann sítt talv á fjórða borði tá hann fekk tvær frífinnur ímóti Gunnari Joensen.

2,5-1,5 til kollfirðingar og enn halda teir endan um fyrsta pláss.

### Hetjan úr Sandavági

Mest yvirraskaði úrslitið í liðkappingin higartil var í Vestmanna tá Gutti Petersen fekk javnleik ímót John Rødgaard eins og dysturin endaði javnur. Ótrúligt úrslit hjá sandavágsmonnum og veteraninum Gutta. John kom sum vant tvær ferðir í herviliga tíðarneyð, og Gutti fann vegin til javnleikin við finnu minni í ólíkafarvaða bispaendatalvinum. John royndi alt hann megnaði at vinna, men Gutti helt høvdið kalt. Hetta má ivaleyst vera besta úrslit hjá Gutta, sum hevur nærum 750 minni í rating enn John.

Liðið úr Sandavági var leygardagin sera skert. Torkil Nielsen er farin til skips og verður ikki við aftur fyrren í február, Berhard Augustinussen, Sonni Nielsen og Heri Christoffersen vórðu heldur ikki við, og tískil sat gamli kenningurin Magni Thomassen á øðrum borði. Torbjørn Thomsen varð tó ein ov stórur biti at slúka og Magni tapti, men veruleikin var at Magni léttliga hevði kunnað ognað sær javnleikin í miðspælinum. Manglandi kappingarvenjing má var helst orsøkin.

Annar kenningur Jóhannes Ártind leikti óventað javnt ímóti John Jacobsen og á fjórða borði vann Eivind Simonsen eisini óvæntað ímóti Petur Højgaard.

Dysturin endaði tí 2-2, og má metast sum sera skuffandi hjá vestmenningum sum vóru fullmannaðir, meðan sandavágsmenn høvdu mist fleir stuðulsleikarar, í roynd og veru var tað B-liðið hjá Sandavágs Talvfelag sum leikti leygardagin.

Sera javnt er, og enn ógjørligt er at spáa vinnaran. Ein ókend støða hjá havnarmonnum at vera í, men kenna vit teir rætt so enda teir helst ovari enn aftasta pláss. Teir hava hvørt ár síðani kappingin byrjaði í 70´unum havt lið í fremstu deild, og eru somuleiðis flest ferðir endaðir ovastir.

Klaksvíkingar hitta vestmenningar komandi sunnudag, meðan hinir dystirnir eru Kollafjørður — Havnin og Sandavági — Hvalvík.

### Havnin á odda í 2. deild

Gongst tað illa hjá høvuðsstaðarfelagnum í fyrstu deild, hevur hinvegin hilnast væl hjá øðrum liði. Tó er ikki langt niður til Gøtu Talvfelag, bert tað hálva stigið.

Á Toftum endaði toppdysturin ímillum toftamenn og havnarmenn við javnleiki 2-2, meðan gøtumenn háláði heilt nógv inn við knúsandi 4-0 sigrinum ímóti Havnini 3. Triðja lið hjá Havnini liggur nú púrt aleina í botninum.

Klaksvíkingar hava eisini eitt hampuliga sterkt annað lið, sum leygardagin vann stórsigur 3-1 ímóti runavíkingum. Á klaksvíksliðnum telvaði Willie Olsen á fyrsta borði ímóti tí ikki minni kenda Ólavi Simonsen, sum í ár roynir eydnuna við runavíkingarnar. Ólavur vann sítt talv, men hinir runavíkingarnir tapti allir.

### 3. deild

Í 3. deild er somuleiðis sera javnt í oddinum. Eins og í aðru deild liggja havnarmenn á odda í trifremstu deildini. Teir vunnu 3-1 á Róki úr Oyri, meðan hitt topliðið úr Kollafirði eisini vann, 2,5-1,5 á Vestmanna 2. Vestmanna 3 vann óvæntað 3-1 á Klaksvík. Hesi vórðu fyrstu stig triðja lið úr Vestmanna fekk.

### Talvið hesa vikuna

Heimsmeistarin og russin Vladimir Kramnik og Peter Leko úr Ungarn hava í døgunum 2-8. januar telva ein kviktalvsdyst, 25 minuttir hvør til talvið. Tólv talv hava teir telva og vegna evstamark hava vit ikki fingið tvey tey seinastu talvini við. Eftir tíggju talvum var støðan 6-4 til Kramnik. Talvið hesa vikuna er tað níggjunda í talvdysti teirra. Í hesum talvi prógvar Kramnik veruliga hví hann er ein verdugur heimsmeistari.

**Kramnik,V (2770) - Leko,P (2743)**
**RWE Gas Match**
**Budapest (9), 07.01.2001**

1.d4 Nf6 2.c4 e6 3.Nc3 Bb4 4.e3 c5 5.Nge2 cxd4 6.exd4 0-0 7.a3 Be7 8.Nf4 d5 9.cxd5 Nxd5 10.Ncxd5 exd5 11.Bd3 Nc6 12.0-0 Bg5 13.Re1 Bxf4 14.Bxf4 Qf6 15.Be5 Nxe5 16.Rxe5 Be6 17.Qd2 Rad8 18.Rae1 h6 19.R1e3 Bd7 20.h3 Qd6 21.Qa5 Qb6 22.Qxb6 axb6 23.Be2 Be6 24.f4 g6 25.Bd3 Bc8 26.Re7 Kg7 27.Bb5 Kf6 28.Rc7 Rd6 29.Rec3 Rdd8 30.Re3 Rd6 31.a4 Rdd8 32.Kf2 Rd6 33.g4 Rdd8 34.Kg3 g5 35.f5 h5 36.Ree7 hxg4 37.hxg4 Kg7 38.Kf3 Kf6 39.Ke3 Kg7 40.Kd3 Kf6 41.Kc3 Kg7 42.Kb4 Kf6 43.Ka3 Kg7 44.b4 Kf6 45.a5 bxa5 46.bxa5 Kg7 47.Kb4 Kf6 48.Kc5 Kg7 49.Be2 Rde8 50.Rxe8 Rxe8 51.Bf3 **1-0**

### 1. Deild

| | | |
|---|---|---|
| **VT** | **ST** | **2-2** |
| IM John Rødgaard | Gutti Petersen | 0.5-0.5 |
| Torbjørn Thomsen | Magni Thomassen | 1-0 |
| John Jacobsen | Jóannes Árting | 0.5-0.5 |
| Dánjal P. Højgaard | Eivind Simonsen | 0-1 |
| **HT** | **KTF** | **0.5-3.5** |
| Haldur Suni Johansen | Steintór Rasmussen | 0-1 |
| Herluf Hansen | Tummas M. Anthoniussen | 0-1 |
| Olaf Berg | Finnbjørn Vang | 0-1 |
| Suni Ziska | Ingolf Gaard | 0.5-0.5 |
| **TFS** | **KT** | **1.5-2.5** |
| Martin Brekká | Hans K. Simonsen | 1-0 |
| Finnbjørn Zachariassen | Bernhard Thomsen | 0-1 |
| Sámal Christiansen | Poul Martin Hansen | 0.5-0.5 |
| Gunnar Joensen | Grettir Djurhuus | 1-0 |

### 2. Deild

| | | |
|---|---|---|
| **KTF 2** | **RT** | **3-1** |
| Willie Olsen | Ólavur Simonsen | 0-1 |
| Óli Joensen | Meinhard Danielsen | 1-0 |
| Esbern Christiansen | Brandur K. Jacobsen | 1-0 |
| Rúni Dragaberg | Eyðun Lamhauge | 1-0 |
| **TT** | **HT 2** | **2-2** |
| Helgi Joensen | Jóhan Gaard | 0-1 |
| Justines Hansen | Michael Jensen | 0.5-0.5 |
| Øssur Hansen | Poul Poulsen | 1-0 |
| Oddmar Andreasen | Jógvan Næs | 0.5-0.5 |
| **HT 3** | **GT** | **1.5-2.5** |
| Jógvan Joensen | Jónfinn Thomsen | 0-1 |
| Sigurð Justinussen | John Joensen | 0-1 |
| Jóhan E. Hansen | Reinhold Isaksen | 0-1 |
| Mortan Thomsen | Jákup F. Joensen | 0-1 |

### 3. Deild

| | | |
|---|---|---|
| **KTF 3** | **VT 3** | **1-3** |
| **VT 2** | **KT 2** | **1.5-2.5** |
| Samson Højgaard | Eyðálvur Johannesen | 0.5-0.5 |
| Kári Durhuus | Karl Louis Johansen | 0.5-0.5 |
| Jón Mikkelsen | Hans P. Joensen | 0.5-0.5 |
| Jákup á Rógvi Andreasen | Alvin Joensen | 0-1 |
| **HT 4** | **Rókur** | **3-1** |
| Øssur Joensen | Bergur Johannesen | 1-0 |
| Frants Eliassen | Mikkjal Joensen | 0.5-0.5 |
| Jákup D. Joensen | Archibald Andreasen | 0.5-0.5 |
| Arnbjørn Dalsgarð | Eyðsvein Johannesen | 1-0 |

**Støðan í 1. deild eftir 4. Umfar**

| | |
|---|---|
| 1. KT 2, Kollafjørður | 9.5 |
| 2. KTF 2,Klaksvík | 9.5 |
| 3. TFS, Hvalvík | 8.5 |
| 4. VT, Vestmanna | 7.5 |
| 5. HT, Tórshavn | 6.5 |
| 6. ST, Sandavágur | 6.5 |

**Støðan í 2. deild eftir 4. Umfar**

| | |
|---|---|
| 1. HT2, Tórhavn | 10.5 |
| 2. GT, Gøta | 10 |
| 3. KTF 2,Klaksvík | 9.5 |
| 4. TT, Toftir | 8.5 |
| 5. RT, Runavík | 6.5 |
| 6. HT 3,Tórshavn | 3 |

**Støðan í 3. deild eftir 4. Umfar**

| | |
|---|---|
| 1. HT4, Tórshavn | 11.5 |
| 2. KT 2, Kollafjørður | 11 |
| 3. VT 2, Vestmanna | 9.5 |
| 4. KTF 3, Klaksvík | 7 |
| 5. Rókur, Oyri | 6 |
| 6. VT 3, Vestmanna | 3 |